## Sviar vilja hava Laudrup

Hóast Lars Lagerback hevur leitt Svøríki til fimm endaspøl á rað, so vlija miðlarnir nú hava annan mann í hansara stað. Og sambært Lasse Sandlin, sum er ítróttarredaktørur hjá Aftonbladet, eru í øllum førum seks mans, sum kunnu røkja sessi nbetri.

Ovastur á mínum lista er Michael Ladrup, sum er besti danski spælarin í søguni og hartil tøkur á arbeiðsmarknaðinum, staðfestir svenski blaðmaðurin.

**-mørk**

## Grov fríspørk

Talan var eftir øllum at døma um nøkur greflig fríspørk, sum portugisar framdu í dystinum móti Hollandi sunnukvøldið. Tí hóast portgisar fingu níggju av teimum sekstan kortunum, sum vórðu givin í dystinum, so framdu teir bara tíggju fríspørk.

Hollendarar framdu 15 fríspørk í dystinum, men hesi góvu so bara 7 kort.

Sambært hagtølunum hjá donsku heimasíðuni, bold.dk, hava dómararnir í HM í miðal givið kort fyri hvørji 6,31 fríspøkr. Í dystinum sunnukvøldið var hetta miðaltal tó 1,56 fríspørk fyri hvørt kortið veit heimasíðan at siga.

**-mørk**

# Skomm fyri fótbóltin




*Valentin Ivanov kom veruliga í focus, tá hann fýra ferðir hevði reyða kortið á lofti í dystinum millum Portugal og Holland Mynd: Scanpix*

**Russiski Valentin Ivanov setti nýtt HM-met, tá hann sunnukvøldið rak fýra spælarar av vølli**

HM 1/8 FINALA
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Í fleiri altjóða miðlum er FIFA-forsetin, Sepp Blatter, endurgivin fyri at siga, at russin so avgjørt ikki skal døma meira við HM. Men at Ivanov heldur sjálvur skuldi fingið reyða kortið fyri sítt avrik í dystinum millum Portugal og Holland.

Fyri fótbóltin kundi tó væl verið ynskiligt, at skjútsið frá FIFA-forsetanum varð vent aðrar vegir. Eitt nú móti spælarunum hjá Hollandi og Portugal, sum snøgt sagt ikki vístu nakað av tí, sum roknað verður við av tveimum liðum, sum eru millum tey 16 bestu í heiminum.

Portugal vann dystin við einsamalla málinum, sum Maniche skeyt fyri steðgin. Men tað fara altíð at vera kortini, sum fara at standa í minninum. Ikki færri enn 16 ferðir hevði russiski dómarin kort á lofti, og fýra ferðir av hesum var talan um reytt kort. Undan hesi HM-kappingini var tað annars bara tvær ferðir komið fyri, at tríggir spælarar vóru riknir av vølli í sama dysti. Men tað metið er so tangerað tvær ferðir hesar seinastu vikurnar, og sunnudagin stóð tað so fyri falli.

### Fúlar tacklingar

Og skal russiski dómarin hava ákoyringar, so má tað helst vera, tí hann var ov seinur við reyðu kortunum. Bæði Costintha og Deco hjá Portugal fingu tvær ferðir gult og harvið reytt kort. Fyri báðar var tó galdandi, at teir skulu prísa sær lukkuliga fyri, at talan bara varð um kort ta fyrru ferðina, tí talan var um tacklingar av somikið fúlum slag, at eitt sivilt rættarmál væl kundi sent teir handan rimar í nakrar vikur.

### Leikbann

Sum so var stóri vinnarin av dystinum kanska Ongland, sum verður mótstøðuliðið hjá Portugal í 1/4-finaluni. Í øllum førum má portugisiski landsliðsvenjarin nú seta sær ein nýggjan miðvøll saman. Costinha og Deco hava báðir verið púra fastir á sentrala miðvøllinum hjá Portugal, men við hvør sínum reyða kortið í skjáttuni sleppa teir ikki at vera partur av dystinum móti Onglandi.

Portugal-Holland 1-0 (1-0)
1-0: Costinha, 23.

Reyð kort: Costinha (POR), 45., K. Boulahrouz (HOL), 63., Deco (POR), 78., G. Van Bronckhorst (HOL), 90.

## Dreymamál sendi Argentina víðari

**Umdystur mátti til, áðrenn Maxi rodriguez við einum fantastiskum máli sendi Mexico úr HM**

HM 1/8 FINALA
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Talan verður um eitt brak av eini fjórðingsfinalu fríggjadagin. Argentina spældi seg í kvøld til dystin móti Týsklandi, men leingi stóð nógv á argentinsku favorittunum.

Tað byrjaði við buldur og brak, tá Mexico legði seg á odda eftir fríspark, og deyðbóltur var eisini upprunin, tá Argentina javnaði stutt eftir.

Fleirir mál komu tó ikki fyrstu 90 minuttirnar, og so gjørdist neyðugt við umdysti. Her avgjørdi Rodriguez dystin við einum framúr vøkrum máli. Á brotsteigarhorninum tamdi hann við bringuni, áðrenn bólturin í einum bleytum boga varð sendur yvir í handara málhorni uttan nakran sum helst møguleika hjá málverjanum.

Argentina-Mexico 2-1 (1-1)
0-1: R. Marquez, 5.
1-1: H. Crespo, 10.
2-1: M. Rodriguez, 98.

## Týskland gjørdi skjótt av

**Svøríki kom seg ongan tíð eftir eina vánaliga byrjan, tá Podolski tvær ferðir sendi bóltin í kassan**

HM 1/8 FINALA
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Týskland verður partur av fjórðingsfinaluni í HM-endaspælinum.

Í dag hevði vertstjóðin ongar trupulleikar av Svøríki, ið mest sum alt fyri eitt fekk av at vita. Tá 12 minuttir vóru farnir, hevði Miroslav Klose tvær ferðir sera hegnisliga lagt upp til álopsfelagan, og so hevði Podolski at kalla avgjørt dystin.

Svøríki megnaði ongantíð at koma seg eftir hetta, og hóast Henrik Larsson misnýtti brotsspark eftir 53 minuttum, so gjørdist talan sjáldan um nakran veruligan spenning.

Týskland-Svøríki 2-0 (2-0)
1-0: L. Podolski, 4.
2-0: L. Podolski, 12.
Reytt kort T. Lukic (SWE), 35.

## Beckham-fríspark var nóg mikið

Eitt framúr vakurt frísparksmál var nóg mikið hja Onglandi, sum í dag basti Ecuador í HM-endaspælinum

Talan var avgjørt ikki um nakað storspæl frá bretunum, sum fyri tað nógva høvdu trupult við at finna rætta lagið í spælinum.

Ecuador hótti eisini nakrar ferðir enska málið, men á tímanum kom forloysingin, tá Davic Beckham bendi eitt fríspark upp um múrin og niður við nærra stólpa. Tað vísti seg at vera nóg mikið, og nú er Ongland til reiðar at møta vinnaran av dystinum millum Portugal og Holland í eini 1/4-finalu.